Stjórin, í Sp/F Røkt, Jóhan í Niðristovu:

# - Kensluborin dagur

**Jóhan í Niðristovu hevði ikki væntað, at fólk møttu so fjølment á Mýrunum mánadagin. Hann ásannaði, at hetta var ein stórur dagur fyri Sp/F Røkt, og hann vil als ikki útihýsa møguleikanum fyri at fleiri vindmyllur verða settar upp á Mýrunum í framtíðini.**



*Tveir fegnir menn. Stjórin í Sp/F Røkt, Jóhan í Niðristovu og verkfrøðingurin hansara, Janus Petersen, vóru sum vera man ovurfegnir um, at verkætlanin hevði borið á mál.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

PRÁT
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Tað var ein ovurfegin, Jóhan í Niðristovu, vit hittu á máli eftir samkomuna.

– Hetta er ein stórur dagur, og ikki sørt kensluborin, sigur stjórin í Sp/F Røkt. Hann fegnast um, at tíðarætlanin helt, og at dreymur hansara endiliga er veruleiki.

Jóhan sigur frá, at hann hevur arbeitt í fleiri ár við tankanum um vindmyllur í Føroyum, og nú hann endiliga hevur rokkið málinum, kann hann ikki annað enn fegnast. Ferð kom ikki á verkætlanina fyrr enn í oktober mánaði í fjør, og síðan hevur gingið støðugt framá.

– Eg gjørdi SEV vart mína ætlan við vindmyllunum, og teir søgdu seg vera áhugaðar, og samstarvið hevur síðan verið fyrimyndarligt, greiðir Jóhan í Niðristovu frá.

### Møguliga fleiri

Jóhan í Niðristovu dylir ikki fyri, at hann longu nú hugsar um at seta fleiri vindmyllur upp í Vestmanna. – Fungera hesar tríggjar væl, og samtarvið við SEV kann halda fram, so eg trúgvi eg væl uppá, at fleiri vindmyllur verða settar upp. Vit hava gjørt pláss fyri fleiri vindmyllum, og vísa hesar seg at rigga væl, so fara vit so avgjørt at arbeiða fyri at fáa fleiri settar upp, sigur stjórin í Sp/F Røkt.

Spurdur, um tær næstu vindmyllurnar eisini verða kallaðar upp eftir fjølbrekaðum í Føroyum, svarar Jóhan í Niðristovu, at tað verða tær eftir øllum at døma. Hann heldur, at hetta er ein góður máti at gera vart við tey brekaðu í samfelagnum.

Seinasta mánaðin hava fjølmiðlarnir gjørt nógv burturúr verkætlanini hjá Sp/F Røkt, og tað kann Jóhan í Niðristovu ikki annað, enn taka undir við. – Eg hevði ikki væntað so nógv fólk komu her í dag, men tað má vera uppmerksomheitin seinastu tíðina, sum fær fólk at koma, sigur hann.

### Dámar væl øðrvísi verkætlanir

Verkfrøðingurin í vindmylluverkætlanini hjá Sp/F Røkt hevur verið Janus Petersen. Verkætlanin við vindmyllinum er fyrsta av sínum slagi hjá Janusi. Hann gjørdist partur av verkætlanini í desember mánað, og síðan hevur hann verið ein av høvuðsmonnunum

Honum dámar væl at arbeiða við øðrvísi verkætlaninum. Tað er ein avbjóðing í sær sjálvum at arbeiða við hugskotum, sum ikki eru roynd áður.

Janus Petersen dylir ikki fyri, at skuldi vindmylluverkætlanin gerast veruleiki, var neyðugt við fólki, ið trúðu upp á tað. Hann var so heppin at sleppa at arbeiða við Sp/F Røkt, sum ongantíð lótu nakran iva vera um, at teir væntaðu, at verkætlanin fór at bera á mál.

Tað kendist væl hjá Janusi Petersen, nú komið var á mál við verkætlanini, og seinasta viðmerking var, at nú fór hann aftur at royna at finna sær eina nýggja, spennandi og ikki minst øðrvísi verkætlan at takast við í framtíðini.

Borgarstjórin í Vestmanna, Gunn Joensen:

# -Vit mugu vera førandi kommunan á orkuøkinum



*Borgarstjórin í Vestmanna kommunu, Gunn Joensen, er errin av monnunum aftanfyri Sp/F Røkt. Hon heldur, at tað ikki langt av leið at siga, at Vestmanna kommuna er førandi kommuna á orkuøkinum í Føroyum.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

PRÁT
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Borgarstjórin í Vestmanna kommunu var eisini til staðar á samkomuni á Mýrunum í Vestmanna seinnapartin mánadagin. Fyriuttan at lata nøkur neyðug loyvi, so hevur Vestmanna kommuna hevur ikki havt nakran avgerandi leiklut í verkætlanini hjá Sp/F Røkt.

Gunn Joensen sigur, at bygdin hevur verið spent, og fylgt væl við, hvussu hevur gingið við seta vindmyllurnar upp.

– Hetta er ein stórur dagur fyri vestmenningar, og vit eru errin av teimum, og ynskja teimum góðan byrð framyvir, sigur borgarstjórin í Vestmanna Kommunu.

### Frammaliga á orkuøkinum

Tá tosað verður um orku í Føroyum, má Vestmanna kommuna vera ein av fremstu kommununum í landinum. Umframt tær tríggjar nýggju vindmyllurnar á Mýrunum, hevur kommunan eisini eitt vatnorkuverk í Heygadali. Afturat verkinum í Heygadali, stendur eisini eitt vatnverk á Válinum.

– Tað kann ikki vera langt av leið at siga, at vit mugu vera førandi kommunan á orkuøkinum í Føroyum. Vit ganga inn fyri alternativari orku, og hóast vit ikki beinleiðis stuðla orkupolitikki í Vestmanna, so royna vit skapa so góðar karmar sum gjørligt. Eftir er bert at vóna, at menninir aftanfyri Sp/F Røkt fáa eitt gott samstarv við SEV, so teir kunnu arbeiða víðari á økinum, greiðir Gunn Joensen at enda frá.

# Julia, Bára og Sóley uppkallaðar

**Í sambandi við vindmyllunum hjá Røkt var samkoma undir Mýrum. Har var millum annað avdúkað, at hesar tríggjar vindmyllur eru uppkallaðar eftir trimum fjølbrekaðum gentum, Juliu, Báru og Sóley.**



*Jóhan í Niðristovu, formaður í Røkt, saman við dóttrini Báru, ið ein av vindmyllunum er uppkallað eftir*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

NØVN
*Henny Olsen*

Mjørkin og tað nógva regnið forðaði ikki teimum, ið høvdu ætlað sær niðan at síggja vindmyllurnar hjá felagnum Røkt verða alment settar í nýtslu. Tær tríggjar vindmyllurnar mugu sigast at kunna draga fólk til sín. Uppi undir Mýrum var stórt telt sett upp, og har var fult av fólki, sum vóru komin at síggja vindmyllurnar og at vísa felagnum Røkt tann heiður, teir hava uppiborið.

Men tað var nakað annað heilt serligt í luftini. Tað var ein errin maður og pápi, ið avdúkaði nøvnini á hesum trimum vindmyllum. Julia, Bára og Sóley. Hetta eru trý heilt vanlig nøvn, men tó ikki so tilvildarlig í hesum samanhangi. Vindmyllurnar eru nevniliga uppkallaðar eftir trimum fjølbrekaðum gentum. Juliu, sum er dóttir Beintu og Aksel Petersen av Toftum. Hon er 6 ára gomul og spastisk. Báru, sum er dóttir Lis og Jóhan í Niðristovu úr Havn, formannin í Røkt. Hon er somuleiðis 6 ára gomul og hevur Tourette's syndrom. Og til síðst Sóley, sum er dóttir Sigrið og Júst Sivertsen úr Havn. Hon er 19 ár og er, sum Julia, spastisk.

Sum Jóhan í Niðristovu tók til, so hevði hetta altíð ligið honum at hjarta at uppkallað vindmyllurnar eftir onkrum, og av tí, at tað í ár er ár teirra brekaðu, stó tað bara klárt.

Bára og Sóley vóru ímillum teir mongu gestirnar, og har varð bæði heilsa og tosað við tær. julia fekk tó ikki verið við, tí hon er til uppvenjingar í Noreg.





*Her eru teir so allir meinninir aftanfyri Sp/F Røkt avmyndaðir. F.v.: Kristian Martin í Niðristovu, Hanus í Niðristovu, Tummas í Niðristovu og Jóhan í Niðristovu.*

# Vindorkan er nú trettanfaldað í Føroyum

**Umboð fyri donsku vindmyllufyritøkuna, Vestas, fegnaðist um góða samstarvið við Sp/F Røkt. Landsstýrismaðurin í orkumálum, Eyðun Elttør, rósti Niðristovumonnunum fyri treiskni og ágrýtni í samband við vindmylluverkætlanina.**

SAMKOMA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Hóast veðrið ikki var av tí besta seinnapartin mánadagin, so settust fólk ikki aftur, og møttu fjølment upp á Mýrunum í Vestmanna fyri at heiðra teimum trimum vindmyllunum hjá Sp/F Røkt. Vindmyllurnar, Bára, Julia og Sóley eru nú farnar undir at framleiða orku til netið hjá SEV.

Eftir ætlan skulu vindmyllurnar í Vestmanna veita góð 3 % av samlaða orkutørvinum í Føroyum. Undan Báru, Juliu og Sóley var bara ein vindmylla í Føroyum, ið framleiddi vindorku. Hon hevur standur á Nesi í Eysturoynni.

Tær tríggjar vindmyllurnar hjá Sp/F Røkt megna at framleiða væl meiri enn vindmyllan á Nesi, og nú tær tríggjar eru knýttar at netinum hjá SEV, er vindorkan í Føroyum heili trettanfaldað

### Landsstýrismaðurin ímóti liberalisering

Stjórin í Sp/F Røkt, Jóhan í Niðristovu, byrjaði samkomuna við at bjóða øllum fólkum vælkomnum. Hann segði seg vera tiknan á bóli yvir, hvussu nógv høvdu fylgt verkætlanina, og fegnaðist um stóru fjøldina, sum hevði leitað sær til Vestmanna.

Jóhan í Niðristovu takkaði millum annað SEV-stjóranum, Klæminti Weihe, Janusi Petersen, verkfrøðingi, Vestas og Amerada Hess fyri at verkætlanin var komin á mál.

Eitt umboð fyri donsku vindmyllufyritøkuna, Vestas, segði eisini nøkur orð, og fegnaðist um góða samstarvið við Sp/F Røkt. Hann gleddist yvir, at Vestas slapp at vera við í spennandi verkætlanini hjá føroyingum, og rósti føroyingum fyri at verða ágrýtnar.

Landsstýrismaðurin í orkumálum, Eyðun Elttør, flutti eisini fram røðu á samkomuni. Hann rósti Sp/F Røkt fyri ágrýtni og treiskni, og fyri at veruliga at trúgva upp á verkætlanini. Eyðun Elttør metti tað vera ógvuliga sera hugvekjandi, at bara tríggjar vindmyllur kundu veita heili 3% av samlaða orkutørvinum í Føroyum.

Kortini vísti hann á, at tað tíverri ikki letur seg gera at seta 100 myllur upp, so Kyoto- sáttmálin verður gingin á møti. El-netið hjá SEV megnar í løtuni einfalt ikki at taka ímóti so stórum parti av vindorku.

Landsstýrismaðurin kundi errin vísa á, at føroyingar teljast ímillum tey lond, ið hava reinastu orkukeldur í heiminum. Vatn- og vindorka eru millum reinastu orkukeldur, ið finnast. Eyðun Elttør boðaði eisini frá í røðu síni, at eitt aðalorðaskiftið um orkupolitikk í Føroyum verður í vetur.

Høvuðsevnið verður væntandi, hvørt vit í framtíðini skulu hava kapping á elmarknaðinum í Føroyum, og landsstýrismaðurin segði seg vera ímóti eini liberalisering á elmarknaðinum. Í sama viðfangi fortaldi Eyðun Elttør, at verður elnetið hjá SEV latið upp við lóg, ið hevur kapping sum mál, skal kappingin stava frá reinari orku.